# Eitt sera hendingaríkt ár - og næsta ár verður ikki slakari

**Hjá Hans Paula Strøm hevur brátt farna árið verið óguliga hendingaríkt og úrslitaríkt og næsta ár verður ikki minni hendingaríkt**

ÁRIÐ IÐ FÓR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, lítur aftur um bak og skal meta um árið sum er um at fara, hevur hann eitt sera virkið og hendingaríkt ár at líta aftur á.

Og tá ið hann lítur frameftir, sær hann eitt ár fyri sær, sum ikki verður minni hendingaríkt.

Av øllum landsstýrismonnunum, er Hans Pauli Strøm tann, sum umsitur nógv tann størsta partin av tí, sum hvørt ár verður játtað á landsins fíggjarlóg.

Og eftirsum hann umsitur alt, sum eitur almannamál og alt, sum eitur heilsumál, fevnir hann sostatt um eitt málsøkið, sum er so vítt-fevnt, at tað rørir við so at siga hvørt einasta heim í Føroyum og onkusvegna eisini við at kalla hvønn einasta føroying.

Men tað er kortini synd at siga, at almanna- og heilsumálini eru tey, sum fylla mest í føroysku fjølmiðlunum, uttan tá ið talan er um gølur og kreppur.

Nú árið er farið at halla, hava vit spurt Hans Paula Strøm, hvørji mál, hann hevur loyst hetta seinasta árið og, hvørji mál eru í umbúna at loysa í árinum, sum skjótt kemur.

Og tað er skjótt at ásanna at tað eru nógv stórmál, sum eru loyst, ella í hvussu so er, loyst úr lagdi í hesum árinum.

Og næsta ár, verður ikki minni hendingaríkt hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum.



*Hans Pauli Strøm hevur nógv tað størstu játtanina á fíggjarlógini og hann umsitur eisini eitt málsøki, har hann onkusvegna rørir við so at siga hvørt einasta heim og hvønn einasta føroying. Vit hava biðið hann líta aftur um bak eftir árinum og fór og frameftir eftir árinum, ið kemur*

## Bæði børn og gomul

Eitt tað størsta ódnartakið, sum er avgreitt í ár, er nýggja barnaforsorgarlógin, sum tað hevur verið ómetaliga torført at finna semju um. Men síðani lógin varð samtykt í vár, hevur umsitingin í almanna- og heilsumálaráðnum arbeitt at kalla hvønn dag við at seta øll tey tiltøk í verk, sum lógin ber við sær, ikki minst hevur tað kravt nógva arbeiðssorku at skipa barnaverndarøkini.

Á barnaøkinum er eisini nýggj lóg sett í gildið um børn við serligum tørvi, soleiðis at børn við serligum tørvi skulu hava somu sømdir sum onnur á dagstovnum. Men fyri børn við heilt serligum tørvi skal ein nýggj stuðulsskipan gerast.

Hans Pauli Strøm fegnast eisini um, at nýggj lóg um fyribyrgjandi heilsutænastur fyri børn og ung er sett í verk.

Børn við serligum tørvi hava eisini fingið tveir nýggjar stovnar. Annar stovnurin er Reiðrið í Eysturoy, sum er ein stovnur til fjølbrekað børn og hin er ein stovnur til børn við psyko-sosialum trupulleikum, ella børn við serligum tilknýtingartrupulleikum og tað fer nú ígongd.

Í hinum endanum er ein nýggj tørvskanning gjørd um, hvussu stórur tørvur er á eldrabústøðum av ymsum slagi, samstundis er nýggj lóg samtykt um stuðul til eldrasambýli.

– Harafturat er útgjaldið úr samhaldsfasta økt nokk so fitt fyri fyrstu ferð í nógv ár.

## Umfatandi broytingar á heilsuøkinum

Eitt annað stórmál, sum hevur verið til viðgerðar í nógv ár, er spurningurin um ílegugransking. Nú er tað so eydnast at fáa eina lóg um ílegugransking, har tað eisini skal skipast eitt ílegusavn, sum skal slóða fyri, so at tað ber til at fara ígongd við eina ílegugransking í Føroyum útfrá ættartalvum.

Næsta ár er so ætlanin at byggja sjálvt ílegusavnið upp við ættarbandsskrá, diagnosuskrá og einum blóðbanka.

Í heilsuverkinum er eisini tann stórhending hend, at nýgg sjúkrahúslóg er sett í gildið, har ein broyting er, at sjúkrahúsráðini eru avloyst av einum felags sjúklingaráði, sum eina og aleina skal røkja áhugamálini hjá sjúklinginginum.

Samstundis er økispsykiatri sett í verk, eins og gongd er fingin á sosialpsykiatri. Eisini eru diabetis-ambulatorium sett á stovn á øllum trimum sjúkrahúsunum.

Á Landssjúkrahúsinum er eisini eitt palliativt toymið segg á stovn. Tað er eitt toymið, sum skal geva doyggjandi sjúklingum heilt serliga linnandi viðgerð og umsorgan.

Á øllum trimum sjúkrahúsunum er røntgenøkið talgilt og næsta ár er so ætlanin at skifta sjálv røntgentólini.

## Heilsupolitikkur í hásæti

Eisini á heilsupolitiska økinum eru stór mál framd. Nýggj tubbakslóg er sett í gildið sum ber í sær 18 ára aldursmark fyri at keypa tubbakk, umframt avmarkingar í marknaðarføringini av tubbaksvørum. Somuleiðis er tað nú ólógligt at roykja á almennum støð

– Endamálið við tubbakslógini er yvirhøvur at avmarkað rásarrúmið hjá roykjarum og ikki minst er endamálið at avmarka tilgongdina av ungum roykjarum

Samstundis er skjøtil settur á eitt heilsuátak fyri skúlabørn við vatni og heilsugóðum kosti í skúlanum. Men Hans Pauli Strøm heldur ikki, at tað skal forsmáast, at fólkaheilsurenningar hava tikið seg ymsastaðni í landinum.

Hans Pauli Strøm umsitur eisini javnstøðumál í landsstýrinum og hann fegnast um, at hann hevur fingið undirtøku fyri at skipa eina tvørpolitiska nevnd, sum skal arbeiða fyri størri kvinnuligari umboðan í kommunu- og landspolitikki.

Hann vísir eisini á, at í ár eru 16 ymsar kunngerðir settar í verk, sum hava manglað.

Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, men tað kostar nógva arbeiðsorku og veruleikin er, at bæði Landsgrannskoðarin og løgtingsgrannskoðararnir hava hava ferð eftir ferð átalað almanna- og heilsumálaráðið fyri at hesar kunngerðir hava manglað, sigur Hans Pauli Strøm.

## Eisini hendingaríkt 2006

Hevur hetta árið verið hendingaríkt, verður komandi ár tað ikki minni.

Eitt nú er ætlanin, at vit skulu hava eina nýggja vanlukkutryggingarlóg. Tað er somuleiðis eisini ætlanin at leggja uppskot fyri løgtingið um heimleys.

Harafturat er eisini endamálið at gera eina serliga fólkaheilsuætlan.

Eitt stórt mál, sum ætlanin er at arbeiða miðvíst við, er bústaðarpakkin, har endamálið er at umskipa Húsalánsgrunnin og íbúðargrunnin, eins og ætlanin er at gera nýggja lóg um luta-íbúðarfeløg og nýggja leigulóg.

– Eg vænti kortini ikki, at vit verða liðug við hetta næsta ár, men vit fara at leggja stóran dent á hetta økið næsta ár.

## Heilsuverkið á breddan

Eisini í heilsuverkinum eru stórar ætlanir.

Hans Pauli Strøm sigur, at ætlanin er eisini at gera eina nýggja sálarsjúkulóg, sum skal avloysa tað gomlu lógina, sum er elligomul og ótíðarhóskandi. Ætlanin er eisini at avtaka lokalu sjúkrakassarnar og at skipa eina felags sjúkrakassa. Í tí sambandi er eisini ætlanin at broyta tilskotsskipanina til heilivág, so at tey, sum brúka nógvan heilivág, skulu sleppa bíligari, samstundis sum at tey, sum sjáldan brúka heilivág, koma at gjalda eitt sindur meir.

Ætlanin er eisini at leggja upp til eitt orðaskifti um eitt framtíðar heilsuverk, serliga nú ein stórur partur av landinum verður samanbundin við vegum og tunlum. Ætlanin um eina talgilda sjúklingaskrá verður væntandi eisini sett í verk.

Landsstýrismaðurin sigur, at ætlanin er eisini at leggja eina virkisætlan fyri brekað og í tí sambandi verða ásetingar um atkomumøguleikar og annað hjá brekaðum. Harafturat er ætlanin at seta á stovn eitt heim fyri autistar í Klaksvík heilt skjótt og í Havn er ætlanin at gera heim fyri sálarsjúk, sum eru so illa fyri, at tey kunnu ikki vera í egnum bústaði ella í sambýli.

Somuleiðis er ætlanin at arbeiðsbólkarnir, sum arbeiða við eftirviðgerð, rehabilitering og uppvenjing av sjúklijngum, sum hava havt heilabløðing og blóðtøpp, sjúklingum við gikt, spastikarum os.fr.

– Tilboðini til teir bólkarnir eru ikki nøktandi og ætlanin er at koma við einum tilmæli um, hvussu hetta økið skal skipast.

– Tað er eisini at gera eitt upprit um, hvussu eldraøkið skal skipast í framtíðini. Í sambandi við spurningin um fosturtøku, ætlar Hans Pauli Strøm eisini at seta eina serliga kvinnuráðgeving á stovn, har kvinnur, sum eru við barn, kunnu leita sær ráðgeving og hjálp, bæði á sosiala og kanska eisini á sálarfrøðiliga økinum.